MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Stjóri til Nám

***Ert tú ein námsfrøðiligur viti, sum brennir fyri útbúgving, læring og nýhugsan, og sum ynskir at slóða fyri fakligari og námsfrøðiligari menning, so er hetta eitt áhugavert starv við nógvum spennandi avbjóðingum.***

## *Starvið*

Uppgávan hjá stjóranum í Námi er at leiða ein stovn, har læring og námsfrøðilig menning eru kjarnuøkini. Stovnurin skal útvega undirvísingarverkinum fjølbroyttar og tíðarhóskandi undirvísingarmiðlar. Harumframt røkir stovnurin ein undirvísingarportal, KT-samskiftisskipan, miðlasavn, skeiðsvirksemi og veitir skúlum, stovnum og lærarum ráðgeving.

Nám skal røkta og menna samskiftiskervið í undirvísingarverkinum, hava námsfrøðiligan verkstað og kunna um undirvísingarmiðlar. Próvstovan, sum er serstøk eind undir Námi, er eisini partur av ábyrgdarøki stjórans.

Ætlanin er at styrkja námsfrøðiliga menningarpartin og ráðgevingina hjá Námi, ið fatar um alt útbúgvingarverkið, líka frá dagstovni til endan á miðnám, herundir eisini sernámsfrøði.

## *Søkt verður eftir stjóra, sum*

- skal mynda og menna Nám, námsfrøðiligu tænastuveitingina, útgávuvirksemið, tøkniligu menningina, eftirmetingar,- royndar- og próvtøkuhald
- skal hava námsfrøðiligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina á stovninum
- er framtakshugaður, sær møguleikar heldur enn forðingar, og dugir at finna loysnir
- skal skapa virðing fyri stovninum, fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum starvsfólk
- skal tryggja, at starvsfólkini hava møguleika fyri førleikamenning
- skal fylgja væl við og luttaka í námsfrøðiligum orðaskifti, úti og heima
- skal ráðgeva Mentamálaráðnum í viðurskiftum, sum stovnurin umsitur

Stjórin skal tryggja, at virksemi stovnsins er á einum høgum fakligum støði, og at játtanin verður nýtt á fullgóðan hátt.

## *Førleikakrøv*

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni og arbeiðsroyndir, sum hava týdning fyri starvið. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari hevur leiðslútbúgving og leiðsluroyndir.

Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjari hevur sýnt

- góðar førleikar at standa á odda fyri námsfrøðiligari menning
- góð leiðslu- og samstarvsevni og mennandi leiðslustíl
- vilja og evni at royna nýggjar leiðir
- góðan málførleika

## *Vit bjóða*

Starvið er spennandi við sjálvstøðugum uppgávum og við nógvum samskifti við skúlar, stovnar og skúla- og stovnsleiðslur. Arbeiðið er á einum høgum fakligum støði, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

## *Setanar- og lønartreytir*

Starvið er sáttmálasett og lønt í 38. lønarflokki sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag landsins uttan tó at vera tænastumannastarv.

Lønin er kr. 51.935 umframt 15% í eftirlønargjaldi. Starvið verður lýst til setanar frá 1. oktober 2017.

## *Umsókn*

Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skal sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella **mmr@mmr.fo**

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin **30. august 2017**.

Umsøkjarar, sum ynskja fleiri upplýsingar, kunnu ringja til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tlf. 55 50 10.

***Nám*** *er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur og undirvísingarmiðlar til skúlaverkið. Høvuðsvirkisøkini eru at útvega fjølbroyttar undirvísingarmiðlar - prentað og talgilt tilfar, undirvísingarportalin Snar, fakliga og undirvísingarliga ráðgeving, skeiðsvirksemi, miðlasavn og útlán, samskiftisskipanin og skeið. Játtanin á fíggjárlógini í 2017 er 13,8 mió. kr., umframt at stovnurin hevur sølu og tænstuveiting fyri 8 mió. kr. Í Námi eru 21 starvsfólk og í Provstovuni eru 7. Sí www.nam.fo*